# Seinasti møguleiki fyri semju um at vera farin

*– Heldur samgongan fast um, at vit skulu úr ríkisfelagsskapinum, er javnaðarflokkurin ikki við longur. Og tað verður okkara egna tulking av ríkisfelagsskapinum, sum verður avgerðandi fyri okkara støðu, gjørdi Jóannes Eidesgaard tvørafólki greitt mánakvøldið*



*– Tað er ikki so trupult hjá javnaðarflokkinum at taka støðu til fullveldismálið. Tí famvegis tykist ætlanin at vera, at vit skulu vera uttanfyri ríkisfelagsskapin og so eru vit heilt einfalt ikki við, fortaldi Jóannes Eidesgaard fyri tvørafólki á fundi mánakvøldið*

Áki Bertholdsen

– Ríkisfelagsskapurin er markið, sum vit ikki fara yvirum.

Hendan boðskapin endurtók Jóannes Eidesgaard, fyri teimum, sum vóru møtt á fundi í Tvøroyar Sosialdemokratiska Felag í TB Húsinum mánakvøldið.

Á fundinum skuldi formaður javnaðarfloksins greiða frá politisku støðuni, og ikki óvæntað var tað gongdin í fullveldismálinum, sum fekk mestu umrøðuna.

Á fundinum gjørdi Jóannes Eidesgaard heilt greitt, at tað kann henda, at javnaðarflokkurin fer at taka seg burturúr viðgerðini í fullveldismálinum.

Hann staðfesti sostatt, at heldur samgongan fast við, at endamálið við samráðingunum við danir skal vera, at Føroyar skulu úr ríkisfelagsskapinum, so er javnaðarflokkurin ikki við meiri og fer at taka seg burturúr viðgerðini.

– Hinvegin hava vit gjørt líka greitt, at er málið við samráðingunum at finna eina skipan, sum varðveitir ríkisfelagsskapin, so eru vit framvegis við, segði Jóannes Eidesgaard.

**Halda fast**

Men tað skiltist á formanninum, at hann hevði ikki góðar vónir um at tað fer at eydnast hjá javnaðarflokkinum og samgonguni at semjast um grundarlagið fyri samráðingum við danir um ríkisrættarligu støðuna hjá Føroyum.

Tí hann segði, at eftir uppritinum, sum samráðingarnar við danir skulu byggja á, er endamálið framvegis tað, sum stendur í samgonguskjalinum, umframt tað, sum stendur í Hvítu Bók og tað, sum stendur í løgtingssamtyktini, sum varð gjørd í oktober í 1998, nevniliga, at Føroyar skulu burturúr ríkisfelagsskapinum.

Annars er uppritið í trúnaði, so hann vildi ikki útgreina, hvat tað annars bygdi á.

Og hann helt eisini, at fer javnaðarflokkurin burturúr viðgerðini, er seinasti møguleikin farin fyri at finna eina breiða semju, fyri teimum ríkisrættarligu broytingunum, bæði í tinginum og í fólkinum sum heild, tí sambandsflokkurin hevur langt síðani boðað frá, at hann er ikki við.

Men hann legði kortini dent á, at enn var javnaðarflokkurin uppi í viðgerðini og hann roknaði við, at hann kom at verða við heilt fram at málstrikuni.

Tí hann vísti á, at bæði løgmaður og landsstýrismaðurin í fullveldismálum, gjørdi seg til talsmann fyri eini breiðari semju, í hvussu so er úteftir.

Men Jóannes Eidesgaard mátti ásanna, at hann síðani er farin at ivast í, hvussu altráð samgongan er eftir eini breiðari semju.

– Eg má siga, at eg havi varhugan av, at kaffifundirnir, vit høvdu við landsstýrið, vóru bara uppá kvamsvís og at landsstýrið ongantíð ætlaði at nakað skuldi spyrjast burturúr.

– Í øllum førum hevur samgongan ikki flutt seg ein tumma, segði hann, hóast vit fleiri ferðir hava ført mál fram, har vit halda okkum hava betri at halda um, enn, hvat samngongan hevur

**Krevja uppskotið**

Formaður javnaðarfloksins vísir eisini á, at í fyrispurninginum til donsku stjórnina um samráðingar, skrivar landsstýrið, at á fyrsta fundinum, sum verður longu í næsta mánaði, er ætlanin at leggja eitt uppskot til ein sáttmála ímillum Føroyar og Danmark fyri donsku samráðingarnevndina.

– Í uttanlandsnevndini hava vit hava spurt, hvat tað er fyri sáttmálauppskot, sum landsstýrið longu hevur klárt. Og við hjálp frá miðflokkinum varð meiriluti fyri at krevja løgmann á fund við uttanlandsnevndina at greiða frá hesum sáttmálauppskotinum.

–Fáa vit ikki innlit í hetta sáttmáluppskotið, vænti eg at viðgerðin fer at taka eina vend, sigur Jóannes Eidesgaard.

Annars metti hann, at tað verður neyðugt, at uttanlandsnevndin heilt skjótt kemur til eina politiskari niðurstøðu í málinum

– Skulu samráðingar verða í komandi mánaði, er ikki nógv at geva av, tí tá ið politiska støðan er tikin í uttanlandsnevndini, skal álit skrivast til landsstýrið og viðgerðast har og tað skal alt verða avgreitt áðrenn 13. mars.

Tó helt Jóannes Eidesgaard, at hetta fór ikki at verða ein trupult hjá javnaðarflokkin at koma til eina politiska niðurstøðu, tí heldur samgongan fast við, at Føroyar skulu úr ríkisfelagsskapin, eru vit heilt einfalt ikki við, endurtók hann.

**Okkara meting**

Á fundinum mánakvøldið var eisini víst á, at nú vóru nógv fólk farin at ivast í, hvat ríkisfelagsskapurin er í veruleikanum.

Og m.a. hevur Annita á Fríðriksmørk sett ríkisumboðnum fleiri spurningar um, hvat ríkisfelagsskapurin er.

Hildið var, at javnaðarflokkurin var í rættiliga stórum trupulleikum um hann ikki fyrrenn nú fer at lýsa, hvat ríkisfelagsskapurin er.

– Tí hevur tað rættiliga stóran týdning, at javnaðarflokkurin ger heilt greitt, hvat hann skilir við ríkisfelagsskapin.

– Vit mugu ikki koma í ta støðu, at vit lata onnur definera ríkisfelagsskapin fyri okkum.

– Tá ið so samráðingarnar við danir verða, má flokkurin so taka støðu til um hetta er uttanfyri ella innanfyri tað mark, sum hann sjálvur hevur sett.

Og útfrá tí verður so tann politiska støðan tikin útfrá tí.

Jóannes Eidesgaard vísti á, at ríkisfelagsskapurin er ikki eitt statsrættarligt hugtak, sum kundi definerast.

Men hann gjørdi eisini púra greitt, at tað bleiv javnaðarfloksins egna tulking av ríkisfelagsskapinum, sum bleiv avgerðandi, fyri, hvørja støðu, flokkurin tók.

– Tá ið endalig støða skal takast til ein nýggjan sáttmála við danir, fara vit at spyrja okkum sjálvi um hetta er ein loysn, sum er innanfyri ella uttanfyri okkara fatan av ríkisfelagsskapinum, og so taka vit støðu eftir tí.

**Ein trupul leiklutur**

Útfrá sínum eygleiðingum seinastu tíðina metti Jóannes Eidesgaard, at ikki minst fólkaflokkurin hevði fingið ein sera truplan leiklut.

–Fólkaflokkurin hevur sett sær eitt eitans mál.

– Og tað, er at sama, hvat úrslitið verður, so skal tað ikki vera hann, sum fær skyldina fyri tað, sum er hent.

Hann vil helst koma burturúr hesum uppá ein máta, sum fær fólk til at halda, at hann hevur gjørt tað hann kundi fyri at røkka málinum at skipa Føroyar sum fullveldið.

– Men vit vita, at ein stórur partur av tingmanning fólkafloksins tekur als ikki undir við fullveldismálinum og tað ger ein stórur partur av veljarum fólkafloksins enn minni, segði Jóannes Eidesgaard.



*Mánakvøldið fingu tvørafólk at vita frá formanni javnaðarfloksins, at, sum støðan er nú, eru smá útlit fyri eini breiðari semju um samráðingarnar, sum verða við danir i næstum um okkara ríkisrættarligu støðu*



# Heimsstjørna syngur sang hjá Kára Jacobsen



*Grace Jones hevur verið í studio í Keypmannahavn og sungið sang hjá Kára Jacobsen. Sangurin fer helst kring allan heim, og nú vil amerikanska songkvinnan hoyra fleiri løg hjá føroyinginum*



*Føroyski sangskrivarin og tónleikarin, Kári Jacobsen, er best kendur fyri ólavsøkusangin um deiligu Havnina, men næstu tíðina verður tað myrka songkvinnan og sjónleikarindan Grace Jones, sum skal syngja um fullkomnað brotsverkið hjá Kára*

Eyðun Klakstein

Hon fór av durum á Manhattan í New York, fleyg um Atlantshavið og brúkti tveir dagar í studio í Keypmannahavn. Alt fyri at syngja ein sang hjá Kára Jacobsen.

Føroyski sangskrivarin og tónleikarin er í Føroyum best kendur fyri ólavsøkusangin um deiligu Havnina, men næstu tíðina verður tað myrka songkvinnan og sjónleikarindan Grace Jones, sum skal syngja um fullkomnað brotsverkið hjá Kára.

– Tað var næstan óveruliga at hava eina so stóra stjørnu og so frálíkan sangara í studio, sigur Kári Jacobsen um dagarnar saman við Grace Jones.

»The Perfect Crime« kallast sangurin, og hann skal brúkast í eini sending, sum danska TV3 hevur lagt nógvar pengar í. Á donskum er heitið á sendingini *Det Perfekte Kup,* og 20. mars fer fyrsti partur av røðini í luftina.

Tá verður tað við nýggja sanginum hjá Kára Jacobsen sum eyðkennislag, og Kári hevur saman við danska samstarvsfelagnum Jacob Duus eisini gjørt annan tónleik, sum skal brúkast í sendingini, sum verður flaggskipið hjá TV3 næstu mánaðirnar.

**Tóku kjansin**

Kári Jacobsen er rættiliga við at koma fram í Danmark. Hann hevur skrivað tónleik til fleiri kendar sjónvarpssendingar, og nú kann samstarvið við Grace Jones seta enn meira ferð á karrieruna.

Seinasta hálva árið hevur yrkisleiðin sum komponistur til tónleik, sum verður brúktur í sendingum sum *Jeopardy* og *Rene ord for pengene,* rættiliga tikið dik á seg.

Størstu uppgávuna fekk Kári frá einum framleiðslufelag, sum skuldi gera eina nýggja sending til TV3. Hetta er ikki bara ein sending, sum skal tveitast inn í skránna eitt tilvildarligt kvøld fyri at rúgva eitt sindur upp. Sendingin er størsta projektið hjá TV3 í løtuni, og hon skal lokka hyggjarar og lýsarar til rásina. Sendingarnar hava kostað eina trivaliga milliónaupphædd at útvikla og framleiða.

– Tá TV3 nú legði so nógv fyri, og alt skuldi verða so og so stórt, so vildu vit eisini gera nógv burtur úr eyðkennislagnum. Vit settu okkum í samband við Grace Jones, og hon vildi fegin verða við, eftir at hon hevði hoyrt sangin hjá okkum, greiðir Kári Jacobsen frá.

– Hetta var ein stór íløga hjá TV3 at gera, og tí var tað alneyðugt fyri okkum, at vit fingu sum mest burtur úr, tá Grace Jones so kom í studio. Tað er langt síðani, at hon var frammi, og í grundini vistu vit ikki við vissu, um hann framvegis kláraði at syngja so væl, sum hon plagdi. Men tað gjørdi hon sanniliga.

**Seljast til onnur lond**

Arbeiðið í studionum í Keypmannahavn tók tveir dagar, og úrslitið heldur Kári Jacobsen verða frálíka gott.

– Hon er veruliga ein sangari í heimsklassa. Tað er ein myrkur og dramatiskur dámur yvir sanginum, og tað passaði røddin hjá Grace Jones sera væl til, sigur Kári.

Áðrenn amerikanska songkvinnan kom í studio, høvdu Kári og Jacob fyrireikað seg væl. Allur tónleikurin var spældur inn, og ein annar føroyingur, Óli Poulsen, var kallaður inn til at leggja seinastu hond á tónleikin.

– Grace Jones visti, hvat hon vildi, tá hon kom í studio, men vit vistu sanniliga eisini, hvat vit vildu hava burtur úr, sigur Kári.

– Hetta er klárt tað størsta navnið, sum eg havi samstarvað við, og tá hon kom í studio fyrstu ferð, kendist tað eitt sindur løgið. Men vit vandu okkum við tað, og tað gjørdist til eina ómetaliga spennandi og stuttliga uppgávu.

Grace Jones var so væl nøgd við sangin, at hon bað Kára og Jacob senda sær fleiri sangir, og tí er eitt framtíðar samstarv við Grace Jones ikki útilokað.

Men fyri fyrst er tað ein sangur, sum føroyski komponisturin og amerikanska heimsstjørnan hava gjørt saman, og umframt at skula brúkast í sjálvari sendingini hjá TV3, skal sangurin eisini gera reklamu fyri sendirøðini. Sangurin verður spældur á ymsum útvarpsrásum í Norðurlondum.

Fleiri sjónvarpsfeløg í øðrum londum eru áhugað í at keypa konseptið til sendingina frá TV3, og gera tey tað, verður tað við sanginum hjá Kára Jacobsen sum eyðkennislagi.

Sama felag, sum gjørdi sendirøðina um stóru floksveitsluna, hevur gjørt nýggju røðina til TV3, og verður hugsað um, hvussu víða flokasveitslan er komin, kann alt henda við Det Perfekte Kup.

Vanligt er, at tá eitt sjónvarpsfelag ger eina nýggja sending, eigur tað rættindini til konseptið, og tað kann seljast til onnur lond. Sendingin um floksveitsluna, sum føroyski Per Zachariasen hevur framleitt, er seld til nógv lond, og í fjør var røðini á topp-10 yvir størstu undirhaldssendingarnar í heiminum.

**Gevast út á stakfløgu**

Møguleikar eru fyri, at sangurin um fullkomnað brotsverkið skal gevast út á eini stakfløgu, og líkt er til, at hendan stakfløgan skal gevast út í fleiri londum.

– Enn vita vit ikki so nógv um hetta, men tá tú hevur við eina slíka stjørnu at gera, so veitst tú ongantíð, hvat kann spyrjast burtur úr, sigur Kári Jacobsen.

Tað kann eisini koma upp á tal, at sangurin hjá Kára skal brúkast á eini útgávu hjá Grace Jones seinni.

– Í øllum førðum hevur eitt slíkt samstarv stóran týdning fyri meg framyvir, tí tað kann hava aðrar spennandi uppgávur við sær, og í løtuni er okkurt á bakkastokki.

Kári Jacobsen hevur nógvu seinnu árini búð í Danmark, men tað er serliga seinasta hálva árið, at hann rættiliga hevur fingið vind í seglini sum komponistur. Og eftir nýggjasta avrikið saman við Grace Jones eru møguleikar fyri, at hann kann náa enn longur innan tónleikaheimin.

Sanniliga eitt fullkomið brotsverk...

## Kommunurnar eiga at hugsa seg væl um

*Tað vísir seg at verða ólíka lættari at seta skattin upp, tá tørvur er á tí. Og hetta er marghåttligt, tí talan er um pengar borgarans, verður sagt frá Føroya Arbeiðsgevarafelag í tíðindaskrivi*

Í seinasta tíðindaskrivi frá Vinnuhúsinum, verður sagt, at nógvar kommunur hava í 90'unum havt trupul ár, við stórari skuld eftir yviríløgur í áttatiárunum. Støðan er nú broytt munandi. Avtalur um skuld eru fingnar upp á pláss, inntøkurnar vaksnar sera nógv, vegna økta virksemið seinastu árini. Ein grund til stóru inntøkurnar hjá kommununum er eisini, at »kreppu-skattaprosentini« enn standa við.

Í 1989, áðrenn nøkur kreppa merktist var miðal skattaprosentið hjá kommununum 15,46 %. Í 1994, tá kreppan var í hæddini var miðal skattaprosenti hjá kommununum 20,41 %. Nú, nøkur ár eftir, at virksemi av álvara aftur tók seg upp aftur, er miðal skattaprosenti enn uppi á 19,81%. Hetta er uml. 4 % yvir einum normalum støði, um vit siga, at skattatrýstið innan kreppuna, á leið myndar eitt útgangsstøði.

Fjølmiðlarnir hava seinastu tíðina borið tíðindir um komunalar íløgur, ið benda á, at ávísar kommunur nú spæla sær við skattapeningi, heldur enn at lækka skattin. Tað vísir seg at verða ólíka lættari at seta skattin upp,, tá tørvur er á tí. Og hetta er marghåttligt, tí talan er um pengar borgarina.

Skal vinnan trívast, er meginreglan: Jú lægri skattur, tess betur, bæði tá ið talan er um persóns- og virkisskatt. Persónsskatturin rakar virkið óbeinleiðis gjøgnum lønartrýstið, og virkisskatturin tyngir um útreiðslunar hjá virkinum og minkar um yvirskotið.

Tí heldur Føroya Arbeiðsgevarafelag, at kommunurnar eiga at hugsa seg væl um, og endurskoða skattaprosentini frá kreppuárunum, verður sagt í tíðindaskrivinum.